Ein bøn fyri heiminum (Prayer for the World)

**Almáttugi Gud – Faðir, Sonur og Heilagi Andi**
Saman við kristnum kring allan heimin
samlast vit í dag fyri at æra og dýrmeta navn Títt
Vit boyggja okkum niður fyri trónu Tíni og ásanna,
at tú ert skapari Himins og Jarðar.
Tað er eingin sum Tú, heilagur og rættvísur í øllum lutum.
Vit boyggja okkum fyri Tínum mynduleika sum Kongur í himli og á jørð
Vit biða við einari rødd fyri at seta Teg á okkara hjartans trónu,
og vit æra teg í heimsins eygum

*Samkoman:* **Harri, tú eina ert verdur**
**okkar prís og tilbiðjan. Vit upphevja Teg.**

**Faðir okkara í himli:**
Takk at tú elskaði heimin so nógv at tú ofraði tín einborna son
Jesus Kristus á krossinum fyri syndir okkara
so vit kundu vera sóna við teg.
Vit eru takksom fyri, at vit kunna kalla teg Faðir
og at vit sjálvi kunna kallast børn Tíni.
Einki kann skilja okkum frá kærleika Tínum.

*Samkoman:* **Takk, Faðir, fyri at tú hevur tikið okkum inn í familiu Tína.**
**Vit rópa nú ”Abba Faðir”**

**Harri Jesus Kristus**
Tú eina ert verdur at opna bókrullina og bróta innsigli hennara
tí at tú vart slagtaður eins og lamb, og Tú hevur endurloyst okkum við blóði tínum
Vit játta, at tú ert høvur kirkjunar og Harri yvir himli og jørð
Máttu fólk av øllum ættum og tungumálum gjørst lærusveinar tínir.
so at stjørnir stýra við rættvísi
Mátti Títt evangelium gjørst kent fyri øllum.
Mátti Tín signing umbroytt menniskju
so at navn títt verður æra frá sólarrís, til sól fer í kav.

*Samkonan:* **Jesus Kristus, Tú er heimsins Frelsari og Harri yvir øllum.**

**Miskunsami og náðar Faðir**
Vit játta, at vit hava synda, og vit ásanna, at heimurin verður hildin fastur av mátti syndarinnar.
Hjarta okkara syrgir yvir órættvísi,hatri,vreiði og harðskapi.
Vit skamma okkum yvir kúgan, rasismu og úthelling av blóði í landi okkara.
Vit syrgja yvir missin av ósekum mannalívum, tá fosturtøkur verða framdar, tá tað er kríggj og terrorrisma, tá fólk vera atsøkt og tá morð verða fram.
Fyrigev okkum tá lív okkara verður dálka av havisjúku, avgudadýrkan og seksuellum syndum.
Fyrigev okkum, tá kirkjur okkara verða spjaddar av uppreistri og hugmóði.
Vit hava gjørt hjarta tínum sorg, og vit hava verðið orsøk til skomm yvir navn títt.
Sýn okkum miskunn og hjálp okkum at angra av heilum hjarta

*Samkoman:* **Miskunsami Gud, fyrigev okkum syndir okkara.**
**Hell út náði tína og grøð okkara land.**

**Tú livandi Andi Guds**
Atskild frá tær kunna vit einki gerða ,
Umbroyt samkomu tína so at hon myndar Jesus Kristus
Forloys tín mátt til at grøða tey sjúku .
og seta tey í frælsi, sum bundin eru, ugga tey sum syrgja.
Gev okkum kærleika tín í hjørtu okkara.
so vit kunna visa samkenslu til tey heimleysu og svongu
Gev okkum vísdóm og innlit í teir trupuleikar, sum vit hava í dag.
Hjálp okkum at brúka ráðvørurnar á jørðini til tað besta fyri øll.
Fyll hjørtu okkara við tínum kærleika og gev okkum neyð fyri næsta okkara.

*Samkoman:* **Halgi andi, vit hava brúk fyri tíni uggan og leiðslu**
**Kom og broyt hjørtu okkara.**

**Harri Jesus Kristus,**
Av tí at tú doyði fyri okkum og reis upp, og av tí at Faðirin hevur givið Tær Navnið  yvir øllum nøvnum, hevur Tú vunnið á øllum mátti hins ónda.
Brót niður hugborgir og hugsjónir, sum forða og seta seg upp ímóti
útbreiðslu av evangeliinum, vit biðja teg um at taka burtur myrkursins slør, sum fjalir eyguni hjá fólkasløgunum
Halt aftur tí ónda sum fremur harðskap og deyða
Ùtfríða menniskjur frá allari kúgan av óndum andum.
brót træla, valdsharra og sjúkdóms ok.
Fyll okkum við dirvi,so vit óttaleys  kunngerða Orð títt
og í fullum áliti  at biða fyri teimum fortaptu

*Samkoman:* **Almáttugi Gud, fría okkum frá tí ónda.**

**Ærunar kongur**
Fullfør verk títt í býum okkara, millum øll fólkasløg og tjóðir. Vit lyfta upp rødd okkara saman við trúgvandi í Afrika, Asien, Miðeystur,Europa, í Noður og Suðuramerka, Australien á Stillahavsoyggjunum. Saman  rópa vit til Tín.

*Samkoman:* **Lyfti tykkum, tit portur**
**Opni tykkum til gomlu dyr**
**so at ærunar Kongur kann trýna innar.**

Soleiðis sum gerningar tínir gerðast meira sjónligir í heiminum, og sum tínar signingar streyma yvir allar tjóðir, koma menniskju at søkja  Teg og spyrja: ”Hvør er hesin ÆrunarKongur?”
Saman vilja vit svara:

*Samkoman:* **Hann er Harrin,  tann almáttugi.**
**Signaður verið Hann, sum kemur í Navni Harrans!**

Kom og fyll jørðin við dýrd tíni sum vatni fyllir vøtnini, Andin og brúðurin siga:

*Samkoman:* **Amen. Kom Harri Jesus!!**